# Ein amerikonsk søga av tí rætta slagnum



*Amerikanarunum dámar væl at hoyra John Edwards greiða frá, at tað ber til at røkka stórum málum, sjálvt um ein veksur upp í smáum korum*

**Ein valfundur við John Edwards er sum ein politiskur missiónsfundur. Maðurin, sum stendur á talarastólinum, er ein, sum hevur álit á sær sjálvum og á søk síni, og sum stríðist fyri at lyfta onnur upp úr teimum smáu korunum, sum hann sjálvur kom úr**

VALSTRÍÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Aftan fyri tað stóra sjálvtøkuborðið stóð ein svørt tænastugenta. Hennara uppgáva var at syrgja fyri, at nóg mikið av vellingi, pylsum og øðrum var á borðinum. Hon arbeiddi dúgliga, men gjørdi lítið burtur úr sær.

Hetta var ein sunnudag. Tey høvdu júst verið í kirkju í býnum Camden í statinum South Carolina, og senatorurin John Edwards var komin á vithan. Hann heilsaði monnunum við teirri sonevndu Clinton-heilsanini - tók í høgru hond teirra og legði vinstra arm á vinstra arm teirra. Eins og Clinton tók hann varisliga um kvinnurnar. Ei undur í, at summar av kvinnunum kendu seg í sjeynda himli, eftir at hann hevði fevnt tær. Sutt frammanundan hevði tíðarritið People Magazine kosið Edwards til tann mest tekkiliga amerikanska politikaran.

John Edwards greiddi kirkjufólkinum frá sínum uppvøkstri í einum lítlum býi. Pápi hansara var arbeiðsmaður og arbeiddi á einari klædnaverksmiðju sum so mangir aðrir menn í býnum. Tann ungi Edwards kundi farið somu leið sum pápin, tá hann var liðugur við skúlan. Hann kundi farið á klædnaverksmiðjuna, og so hevði hann arbeitt har enn. Men hann valdi at fáa sær eina útbúgving, og tað eydnaðist honum at gerast ein tann dugnaligasti sakførarin í øllum Suðurstatunum. Hann bleiv eisini ríkur.

Hetta er ein ótrúlig søga, ein amerikonsk søga av tí rætta slagnum. Áhoyrararnir vilja fegnir hoyra hana, og teir elska mannin aftan fyri søguna.

Tænastugentan við sjálvtøkuborðið, sum man vera um miðjan aldur, roynir at lurta eftir honum, meðan hon fæst við at fylla tey tómu føtini. Tað sæst á andliti og kroppi hennara, at hon hevur havt eitt strævið lív. Hvat skal hon halda um ein politikara sum John Edwards, sum sambært sakføraratíðarritinum North Carolina Lawyers Weekly eigur 38 milliónir dollarar? Er hetta ikki bara uppaftur ein av hesum ríku, hvítu monnunum?

Svarið finna vit í ævisøguni hjá senatorinum.

Allir áhoyrararnir, tænastugentan og kirkjufólkið, vita, at lívsleiðin hjá John Edwards hevur ikki verið nakar dansur á rósum. Hann byrjar hvønn einasta valfund við sanginum "I was born in a small town" ("Eg varð føddur í einum lítlum býi") , men har verður eisini sungið um stríð, sorg og sakn.

Í barnaheiminum hjá senatorinum vóru bara trý rúm - ein køkur, ein stova og eitt kamar, og pápin og mannan máttu arbeiða í vaktum á klædnaverksmiðjuni í Utica í South Carolina, so tey kundu gjalda húsaleiguna og læknarokningarnar. Húsini leigaðu tey frá verksmiðjuni.

## Gløggur og dugnaligur

Tá tann lítli John Edwards fór í skúla, varnaðust lærararnir skjótt, at hann var sera namur, og hann var skjótur at taka av, tá hann fekk tilboð um at nema sær eina útbúgving. Tað er sagt um hann, at hann var íðin sum fáur, og tá skúlafelagarnir í sekstiárunum lótu hárið veksa og fóru at roykja hasj og tað, ið verri var, gekk John Edwards sína egnu leið. Hann klipti sær javnan, var høviskur og tók ikki lut í teimum nógvu mótmælisgongunum, sum tey lesandi javnan skipaðu fyri. Hann var ein av teimum, sum fingu tey eldru í sekstiárunum at halda, at USA hóast alt hevði eina framtíð. Í lestrarárunum møtti hann gentuni, sum seinni gjørdist kona hansara, og tá hann var liðugur at lesa løgfrøði, fór hann til arbeiðis.

Sum sakførari legði hann seg eftir málum, ið snúðu seg um endurgjald, og tað vóru serliga tey smáu og veiku, sum gjørdust viðskiftafólk hansara. Í 1985 gjørdist hann víða kendur, tá tað eydnaðist honum at vinna einum fyrrverandi alkoholikara 3,7 milliónir dollarar í endurgjaldi fyri skeiva viðgerð á einum sjúkrahúsi. Í nítiárunum legði hann seg eftir at virka sum sakførari hjá børnum, sum høvdu fingið heilaskaða, tá tey vórðu fødd. Í 1997 átók hann sær at vera sakførari hjá einari gentu, sum hevði fingið skaða í einum svimjihyli. Felagið, sum átti svimjihylin, beyð sær til at rinda gentuni 17 milliónir dollarar í endurgjaldi. Men tað vildi Edwards ikki góðtaka, og tað endaði eisini við, at gentan fekk 25 milliónir dollarar.

Tey, sum kenna John Edwards, siga, at hetta sakarmálið gevur eina góða mynd av persónsmenskuni hjá manninum. Hann hevur ótrúliga stórt álit á sær sjálvum, og hann veit, nær hann kann vinna eitt sakarmál. Hann er heldur ikki bangin fyri at váða nógv, tí í síðsta enda lítir hann á, at nevningarnir ella veljararnir fara at geva honum rætt.

Hetta er tann almenni parturin av ævisøguni hjá John Edwards. Men søgan hevur eisini er persónligan part.

## Sorgin

Men kirkjufólkið og veljararnir vita eisini um ein annan part av ævisøguni hjá John Edwards - tann týdningarmesta partin, sum Edwards sjálvur ongantíð tosar um: Sonin Wade.

Tann 16 ára gamli Wade líktist nógv pápanum, men ein dagin í apríl í 1996 doyði hann í einari ferðsluvanlukku. Vanlukkan mundi tikið beinini undan húskinum. John Edwards gjørdi av at lata sakføraraskrivstovuna aftur, og konan, sum eisini hevði arbeitt sum sakførari, gavst eisini. Tað kendist, sum alt, sum tey høvdu virkað fyri, var farið til geundar. John Edwards kom til ta niðurstøðu, at lívið var annað enn arbeiðið og hansara egna familja. Hann gjørdist trúgvandi og fann sína støðu í tí politiska lívinum. Í 44 ár hevði hann als ongan áhuga havt fyri politikki, og hann hevði mangan sitið við hús, tá amerikanararnir vóru á vali. Sonurin Wade hevði haraftur ímóti havt stóran áhuga fyri politikki, og hann hevði eisini skrivað eina stuttsøgu um politikk.

John Edwards valdi at fara upp í politikk, og á senatsvalinum í 1998 eydnaðist tað honum at fella ein republikanara, sum hevði sitið í Senatinum í mong ár. Edwards gjørdist ein lýsandi stjørna í tí demokratiska flokkinum. Í 2000 umhugsaði Al Gore at fáa sær hann til varaforsetaevni, og í ár var hann ímillum teirra, sum royndu at gerast forsetavalevni. Tað gjørdist hann ikki, men nú er hann varaforsetaevni hjá John Kerry.

## Eitt var eftir

Valfundurin í Camden er liðugur. John Edwards fer yvir ímóti hurðini, og tíðindamenn og myndamenn gera seg til reiðar at seta honum spurningar. Men eitt er eftir.

– Haldið mær til góðar, sigur hann við kirkjufólkið og tíðindamenninar. So fer hann yvir ímóti sjálvtøkuborðinum, har tann svarta tænastugentan stendur og stákast. Hann nevnir hana við navni og fevnir hana uttan at geva sær far um tað dálkaða fyriklæðið. Hann brosar. Tað ger hon eisini. Tað er týðiligt, at hann fevnir ikki tænastugentuna fyri at geva myndamonnunum eina góða mynd. Nei, hetta er tann veruligi John Edwards, maðurin hjá teimum smáu og veiku.

Og hendan lýsingin gevur ta bestu frágreiðingina um, hví John Kerry valdi sær John Edwards til varaforsetaevni.

*(Kelda: Berlingske Tidende)*




# Hús til sølu

**Dalavegur 50 í Tórshavn** • Miðskeiðis í býnum við útsýni yvir Havnina



Húsini eru vælhildin og standa høgliga fyri í veðurgóðum umhvørvi miðskeiðis í býnum við útsýni yvir Havnina. Húsini eru í tveimum hæddum við einum høgum útbygningi á miðhæddini. Uttanfyri er stórur urtagarður.
**Miðhædd:** Gongd, køkur, stór stova, loftstova, 2 kømur, baðirúm við gosbað/toilett, gestatoilett og hjallur.
**Kjallarahædd:** 3 kømar, goymslurúm, fýr og vaskirúm, toilett.
Uttanfyri er stórt "fjós", sum er innrættað og hevur verið brúkt sum seymistova. Húsini kunnu einsvæl nýtast til skrivstovuvirksemi av ymiskum slag.

| Um húsini: | |
|---|---|
| Byggiár: | 1987 |
| Vídd á grundøki: | 1124 fermetrar |
| Innrættað vídd | 280 fermetrar |

Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.

inni
- trygt og ómakaleyst til hús

**Inni P/f • N. Finsensgøta 37 • 100 Tórshavn**
**Tel 320410 • Fax 320510**

# Tvingsilssøla

**Fríggjadagin**
**tann 27. august 2004**
**kl. 9.30**
verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir matr. nr. 390 c, Hvalba, (AS 2-10/2004).

Talan er um bygning á leigugrund, egningarskúrur og frystigoymsla í einari hædd, bygdur á havnarøkinum í Hvalba. Bygningurin 227 m² til støddar, gjørdur av timbri og betong, taktur við stáli. Grundstykkið er til víddar 350 m².

Tvingsilssølan er umbiðin av **Annfinn V. Hansen, adv., Bryggjubakki 22, Tórshavn, tlf. 359595 (j.nr. 211801)**, sum kann geva nærri upplýsingar, eins og avtala kann gerast við um at síggja ognina.

Søluuppgerð kann umbiðjast frá nevnda advokati ella hyggjast ígjøgnum á dómaraskrivstovuni.

**Føroya Fútarættur,**
*tann 14. juli 2004*

# Til skrivstovu okkara

sóknast vit eftir einum fyrikomandi, ágrýtnum og álítandi fólki at arbeiða 1/2 tíð (fyrrapart).

Starvið umfatar í høvuðsheitum vanligt skrivaraarbeiði so sum umsiting av sølu-/keypsavtalum og øðrum avtalum, nakað av bókhaldi og annars fyrifallandi arbeiðsuppgávur frá leiðsluni.

Tann, ið settur verður, má kunna arbeiða sjálvstøðugt, og tað er ein treyt, at viðkomandi hevur skrivstovu- ella líknandi útbúgving og hevur arbeiðsroyndir.

Lønin verður ásett sambært avtalu.

Skrivlig umsókn við prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til P/f Poul Michelsen, Postrúm 200, FO-110 Tórshavn, í seinasta lagi 26. juli. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Tørvar tær meira kunning um starvið, ber til at ringja til P/f Poul Michelsen á tlf 31 46 50 og tosa við Niels Juel Arge, fíggjarstjóra. Fyrispurningar og umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

**P/F Poul Michelsen**

SetHúsaSølan
Sp/f SHS · Tórsgøta 16 · Postboks 3156 · FO-110 Tórshavn
Fax 320 252 · sethusas@post.olivant.fo · www.sethusasolan.fo
Avgreiðslutíð: 10 - 13 á tel 210252
Skrivstovan opin: 14 - 17 tel 320252

NÝTT



**Tórshavn: Eigaraíbúð nr. 36 Berjabrekka 159**
*Matr.nr. 1464c, grundøki 100,4 m²*
Íbúðin er bygd síðst í 80-arunum, er í 2 hæddum, stovu- og loftshædd íalt uml. 89 m² + úthús 9m².
Á stovuhæddini er: Durur, køkur, borð- og sitistova.
Á Loftshæddini er: Gong hjúnarrúm, kamar, baðirúm.
Frá stovuhæddini er góð terassa.
Úthúsið er væl inrættað til grovkøk og vaskirúm, flísar á gólvinum
**Íbúðin verður seld, um nøktandi boð fæst**

NÝTT



**Hoyvík: Tvíhús Onnugøta 10b**
*matr. nr. 1hq, grundøki 300 m²*
Húsini, ið eru bygd síðst í 80-árunum, eru í 2 hæddum, stovu- og loftshædd íalt uml. 118m2 + bilhús 50m2.
Á stovuhæddini er: Gong, køkur og stova, wc og kamar.
Á loftshæddini er: Hjúnarrúm, 2 kømur, WC við brúsu.
Húsini hava altan frá loftshæddini eins og tað er stór terassa frá stovuhæddini.
Bilhúsið er leyst frá húsunum, og innrættað við skrivstovu, wc og brúsu. Gólvið er lagt við klinkum.
**Húsini verða seld um møktandi boð fæst!**



**Tórshavn: Sethús Oman Mattalág 6**
*Matr. nr. 899p, grundøki 322 m²*
Húsini, ið upprunaliga eru bygd í 60 árunum, eru í 3 hæddum, íalt umleið 240 m². Stoypt grund, stovu- og loftshæddin timbur, klødd við plastbrettum í 70 árunum og bjálvaði. Eternittak. Termorútar í stovu- og loftshæddini. Í stovuhæddini er gong, WC, kamar, køkur og 2 stovur. Á loftshæddini er gong, baðirúm, hjúnarúm við altan og 2 kømur. Í kjallarahæddini er ítrivsrúm, hjallur og stórt kjallararúm. Húsini eru vælhildin og hava gott útsýni frá loftshæddini!
**Verða seld, um nøktandi boð verður givið!**



**Hoyvík: grundøki Gillagøta**
*matr. nr. 135cr. Stórt 517 m²*
Byggibúgvi og byggiklárt:
Stykkið er útgrivið, planerað og steinsett.
**Verður selt, um nøktandi boð verður givið!**



**Tórshavn: sethús Dj. Í Geilsgøta 59**
*Matr.nr. 706s, grundøki 446 m²*
Húsini, ið eru bygd siðst í 60-árunum, eru í 3 hæddum, stovu- og kjallarahædd íalt uml 240m2 + loft. Í kjallarahæddini er garaga og sjálvstøðug íbúð: durur, gong, wc, brúsa, kjallari, køkur, goymslurúm, stova og 2 kømur. Á stovuhæddini er durur, gong, baðirúm, køkur, arbeiðsrúm, stova, 3 kømur og hjallur. Loftið óinnrættað. Húsini eru umvæld í 90-unum: tak, oljufýr, vindeygu v.m.
**Verður selt, um nøktandi boð verður givið!**



**Hoyvík: raðhús Maritugøta 11**
*matr. nr. 1æt, grundøki stórt 137 m²*
Húsini eru í tveimum hæddum íalt umleið 120 m² alt innrættað! Í stovuhæddini er durur, gong, køkur og stova í einum, vaskirúm v/WC. Á loftshæddini er gong, baðirúm, hjúnarúm og 2 kømur. Uppí húsini er bygt goymslurúm/hjallur. Húsini eru nýggj. Øll gólv eru Dinesen plankagólv. Køkurin er ein klassa fyri seg. Má síggjast!
**Verður selt, um nøktandi boð verður givið!**



**Tórshavn: sethús Brattalíð 6**
*matr. nr. 1191, grundøki stórt 413 m²*
Húsini eru í tveimum hæddum alt innrættað, íalt umleið 190 m². Í stovuhæddini er durur, gong, køkur, stova, 2 kømur, hjúnarúm, baðirúm, trappurúm og hjallur. Í kjallarahæddini er sjálvstøðug íbúð: Durur, gong, køkur, stova, 2 kømur og baðirúm. Harumframt er fýr/kjallararúm og vaskirúm og ein útbygningur. Urtagarður við trøum og runnum, flísatún, brotflísar á trappu og góð sólterassa. Støðupláss til bil.
**Verður selt, um nøktandi boð verður givið!**



**Kollafjørður: sethús**
*matr. nr. 304, grundøki stórt 786 m²*
Húsini eru í 3 hæddum íalt góðar 275 m². alt innrættað! Í kjallarahæddini er stór garasja, gong, ítrivsrúm og fýr/vaskirúm. Á stovuhæddini er gong, køkur, borðstova, sitistova, ítrivsrúm, baðirúm, altanur og stórur hjallur. Á loftshæddini er gong, 3 kømur, hjúnarúm og baðirúm. Stórt nossligt ovastaloft. Betongdekk millum kjallara- og stovuhæddin
**Verður selt um nøktandi boð verður givið!**

Sosialurin 341800